Jaspur Langgaard
løgtingsmaður

Nr. 27/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um endurrindan av tunnilsgjaldi til pendlarar, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu hevur gongdin verið fyri árlig útgjald av ferðastuðli fyri koyring gjøgnum ávikavist Norðoyatunnilin og Vágatunnilin seinastu 10 árini?
2. Kunnu t.d. 4 fólk koyra saman og øll hvør sær fáa endurrindað tunnilsgjald frá Taks sum ferðastuðul?
3. Er skipanin við endurrindan eisini galdandi fyri tey, sum brúka buss?

Viðmerkingar:

Reglurnar um ferðastuðul hava m.a. til endamáls at geva borgarunum møguleika fyri at forsyrgja og vitja familjuna hjá sær, hóast ein arbeiðir aðrastaðni.

Í hesum sambandi endurrindar TAKS tunnilsgjald sum ferðastuðul til tey, sum pendla.

Ferðastuðul er peningaligur stuðul, ið verður veittur teimum, ið ferðast longri enn 20 km. millum bústað og arbeiðsstað, og sum lúka treytirnar fyri at fáa stuðulin.

Søkjast kann um ferðastuðul fyri eitt hálvt ár í senn, og søkjast kann bara um útreiðslur, sum longu eru hildnar. Søkjast kann ikki fram í tíð.

Tey, sum pendla gjøgnum Vágatunnilin og Norðoyatunnilin fáa eftir galdandi reglum um ferðastuðul meginpartin av tunnilsgjaldinum endurgoldið og harvið minkar tørvurin á at avtaka tunnilsgjøldini munandi. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi 7. oktober 2020

Jaspur Langgaard